Kommunuskúlin

# Fedranna tala fimmti ár seinni

**Í ár eru liðin 50 ár síðani Tórshavnar Kommunuskúli varð vígdur 2. september 1956. Hetta fer ikki aftur við borðinum uttan markeringar.**

HÁTÍÐARHALD

*Orð/mynd: Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Havn: Ein slík markering var gjørd fríggjakvøldið, tá ein serstøk hátíðarkonsert varð hildin í Auluni, sum annars hevur hýst so mongum øðrum tónlistarligum tiltøkum hesa hálvu øldina.

Hetta kvøldið vóru tað børnini og tey ungu, sum settu sín dám á konsertina. Bæði við sangi, upplestri og ikki minst tónleiki framførdu tey fleiri løg sjálvi – og lutvíst saman við lærarum skúlans.

Millum verkini sum vórðu framførd var "Fedranna Tala" sum Heðin Brú yrkti til vígsluna.

Nú – 50 ár seinni – var tað eitt barnakór, lærarakór og Skúlaorkestur Tórshavnar Kommunuskúla sum framførdi hetta megnar verkið, sum Hans Jacob Højgaard hevur gjørt lagið til.

Við í kórinum var eitt stórt tal av børnum, sum Andrea Heindriksdóttir hegnisliga leiddi. Saman við teimum vóru fleiri strúkarar og blásarar. Sanglestrinum stóð kenda songkvinnan Kristel Lisberg fyri, saman við Rakul Thomsen.

Aulan í Kommunuskúlanum var fullsett við hetta høvið.



*Kór og orkestur úr skúlanum settu dám á hátíðarhaldið fyri skúlanum sjálvum*

## Umsíðir kemur rundkoyringin í Hoydølum



*Rundkoyringin í Hoydølum kemur ´´i tøkum tíma*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Nógvir munnu teir bilførarar vera, sum hvønn einasta morgun um 8-tíðina hava ilskast inn á longu bilkø'ina í Hoydølum. Tórshavnar kommuna fer nú at gera nakað við trupulleikan, og einaferð komandi ár verður ein rundkoyring veruleiki her.**

FERÐSLA

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Havn:** Ætlanin við rundkoyringini er gomul, men er ikki vorðin minni neyðug sum árini eru gingin og ferðslan vaksin dag frá degi.

Býráðið hevði á fundi hósdagin hetta málið til viðgerðar, nú avtala verður gjørd um gerðabýti við ein av jarðareigarunum við rundkoyringina. Talan er um eitt 400 fermetrar stórt øki.

At gera eina tílíka rundkoyring er ein landsuppgáva, men sum skilst er eingin loysn enn funnin á hesum higartil til dags. Ikki fyrrenn nú, ið kommunan sjálv fer undir hetta.

Tað eru nógv sum hava irriterast inn á bilkø'ina her – eisini borgarar í Havnini. Tí verður nú av álvara farið til verka við hesi ætlanini, sum fer at verða øllum teimum koyrandi at gagni.

Arbeiðið fer at taka ein stóran part av komandi ári.

Annars verður arbeitt við eini aðrari ætlan um at gera ein uttara ringveg inn í Havnina. Alt hetta fer at lætta um hjá ferðsluni. Hinvegin er ikki óhugsandi, at ein beinanvegin má fara undir fyrireiking av øðrum loysnum, við teirri ferð sum talið av bilum økist dag frá degi.




*Kalsoyingar fáa ikki bilin úr Klaksvík hesar komandi dagarnar*

## Skerdur flutningur hjá kalsoyingum

**Fyrstu dagarnar av komandi viku verður eingin flutningur av bilum til Kalsoynna. Sam er enn á sleipistøð og Ternan skal sigla um Skopunarfjørð.**

SAMFERÐSLA

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Kalsoy**: Frá í dag og fram til mikudagin siglir Alfa Pilot í Kalsoynna. Av hesi orsøk verður ongin flutningur av bilum millum Kalsoynna og meginlandið hetta tíðarskeiðið.

Orsøkirnar til hesar broytingarnar í ferðaætlanini hjá Strandferðsluni er, at Teistin skal í dokk mánadagin. Tí verður Ternan, sum í løtuni siglir fyri Sam, flutt av Kalsoyarleiðini til Sandoyarleiðina.

Sam skuldi eftir ætlan verið liðugur á beding sunnukvøldið, men av tí at arbeiði er komið afturat, verður hann ikki settur í sigling fyrr enn hósdagin – Kristi Himmalsferðardag.

Strandferðslan hevur annars gjørt avtalu við Dragaberg um flutning av farmi til Kalsoynna.